FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

17. august 2021
Mál: 21/15389-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-011/2021

Svar til fyrispurning 52-011/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um alment innlit í sambandi við menningarkvotur og kvotur til vinnuligar royndir v.m.

Spurningar:

1. Hvussu nógvar umbønir um alment innlit frá fjølmiðlum – herundir serstakt frá Kringvarpi Føroya – fekk Fiskimálaráðið um menningarkvotur, umsóknir og viðgerðina av teimum í 2018 og 2019?

2. Hvussu nógvar umbønir um alment innlit frá fjølmiðlum – herundir serstakt frá Kringvarpi Føroya – hevur Fiskimálaráðið fingið um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir umframt ískoytiskvotur, umsóknir og viðgerðina av teimum í 2020 og 2021?

3. Hvussu nógvar umbønir frá fjølmiðlafólki – herundir serstakt frá Kringvarpi Føroya – um at svara spurningum um menningarkvotur, umsóknir og viðgerðina av teimum fekk Fiskimálaráðið og/ella landsstýrismaðurin í 2018 og 2019 (áleið)?

4. Hvussu nógvar umbønir frá fjølmiðlafólki – herundir serstakt frá Kringvarpi Føroya – um at svara spurningum um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir umframt ískoytiskvotur, umsóknir og viðgerðina av teimum fekk Fiskimálaráðið og/ella landsstýrismaðurin í 2020 og 2021?

Svar:

Til nr. 1.
Í 2018 hevur Fiskimálaráðið skrásett 18 umbønir frá fjølmiðlafólki um alment innlit viðvíkjandi menningarkvotum, harav vóru 7 frá Kringvarpi Føroya.

Í 2019 hevur Fiskimálaráðið skrásett 14 umbønir frá fjølmiðlafólki um alment innlit viðvíkjandi menningarkvotum, harav vóru 3 frá Kringvarpi Føroya.

Til nr. 2.
Í 2020 hevur Fiskimálaráðið skrásett 1 umbøn frá fjølmiðlafólki um alment innlit viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum umframt ískoytiskvotum. Umbønin var frá Kringvarpi Føroya.

Í 2021 hevur Fiskimálaráðið higartil skrásett 4 umbønir frá fjølmiðlafólki um alment innlit viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum umframt ískoytiskvotum, harav hevur 1 umbøn verið frá Kringvarpi Føroya.

Til nr. 3.
Í 2018 hevur Fiskimálaráðið skrásett 1 umbøn frá fjølmiðlafólki, um at svara spurningum um menningarkvotur. Umbønin var frá Kringvarpi Føroya.

Í 2019 hevur Fiskimálaráðið skrásett 1 umbøn frá fjølmiðlafólki, um at svara spurningum um menningarkvotur.

Til nr. 4.
Í 2020 er eingin umbøn frá fjølmiðlafólki skrásett, um at svara spurningum viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum umframt ískoytiskvotum.

Í 2021 er eingin umbøn frá fjølmiðlafólki skrásett, um at svara spurningum viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum umframt ískoytiskvotum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður